# Tú hevur ongan

## Vandamikla Facebook

Nøkur góð ráð at hava í huga, tá tú leggur nakað út á Facebook:

- Tá tú teknar teg til Facebook, góðtekur tú, at tínar upplýsingar og myndir kunnu verða brúktar til tað, sum Facebook vil, t.d. í lýsingum
  Facebook virkar undir eini sera liberalari amerikanskari lóggávu
- Facebook skilar sær rætt til at broyta brúkaratreytirnar
- Finn út av, hvat tú skalt krossa av fyri at verja tínar upplýsingar best møguligt
- Lat ikki alla teldupostadressubókina frá tær, tá tú teknar teg.
- Facebook goymir allar bústaðir hjá vinum, sum tú bjóðar, uttan mun til um tey velja at tekna seg ella ikki
- Halt ikki at upplýsingarnar eru loyniligar, hóast tú kanska hevur ein heldur afturlatnan profil. Fyri tað fyrsta hevur Facebook møguleika fyri at brúka upplýsingarnar alla staðni – og lítur tú veruliga á allar tínar 300 vinir
  Strika Facebook-profil
  Um tú vilt strika teg úr Facebook, verður tað ikki gjørt við bara at melda teg frá og so rokna við, at allar upplýsingar um teg eru burturi. Tín profilur liggur framvegis har, men er bara ikki sjónligur. Facebook hevur framvegis ræði á tínum upplýsingum og myndum. Soleiðis strikar tú tín profil tryggast møguligt:
- Far inn á ”Privacy” og ger tín profil privat mest møguligt – soleiðis at so fá sum møguligt kunnu fara inn á hann.
- Strika vinir – hetta má gerast manuelt við at tú fer inn á ”Remove friend” í hvørjum einstøkum føri.
- Strika teg úr øllum bólkum. Strika allar upplýsingar, sum tú hevur lagt út um teg sjálva.
- Strika fráboðanir á ”wallinum” – kanska tær mest persónligu.
- Strika allar myndir, tú hevur lagt út og bið helst onnur, sum hava lagt myndir út av tær um at strika tær.
- Bið um at fáa broytt títt navn undir „Change name“.
- Broyt teldupostbústað undir “Account” ovast í høgra horni
- Ger tína konto óvirkna.

*Kelda: Dátueftirlitið*

Gjøgnum tíðina eru nógv fólk kring knøttin komin í neyð av sosialum netverkum á internetinum. Í løtuni er Facebook tað, ið fremur mest mannatokka, og tí eisini flestar trupulleikar.

Dátueftirlitið vil ikki mæla fólki frá at nýta hesar nógvu møguleikar, men tey ávara fólk, um ikki at lata ov nógvar upplýsingar á Facebook, tí Facebook hevur tilskilað sær rættindi at nýta alt tilfar, ið nakrantíð er komið út á heimasíðuna. Eisini eftir, at tín vangamynd er tikin av síðunum.

Treytirnar, sum tú skalt góðtaka áðrenn tú verður limur, geva eisini Facebook víðfevnandi rættindi.

Hesar treytir bera millum annað í sær, at allir upplýsingar, tú leggur út á Facebook, eru vørur, sum Facebook hevur loyvi til at selja víðari.

Hinvegin sendi Facebook í seinastu viku eitt skriv út, har heimasíðan harmaðist, at teir hava hesi rættindi, og at tað ongantíð hevur verið ætlanin hjá heimasíðuni at selja myndir og tekst hjá fólki til nakran triðjapart.

Sært tú til dømis eina lýsing við teksti og eini mynd við tær á, sum tú hevur lagt út, so skalt tú ikki verða kløkk, tí tú hevur longu givið Facebook loyvi til at nýta allar myndir á tíni vangamynd til tað endamál, sum Facebook ynskir.

Facebook eisini tilskilar sær rættindi at broyta treytirnar á heimasíðuni til eina og hvørja tíð, og hvørja ferð tú innritar teg, so góðtekur tú treytirnar einaferð enn.

- Facebook er nógv kritisera. Í seinastuni serliga av danska brúkararáðnum, tí mann fer so vítt. Facebook er undirlagt kalifornskari lóggávu, og hon er nógv linari enn til dømis tann danska, sigur Ingunn Eiriksdóttir á Dátueftirlitinum.

### Klagur

Dátueftirlitið fær av og á klagur frá fólki, sum eru komin í neyð av sosialum netverkum.

- Klagurnar koma ofta periodiskt. Til dømis, tá vit í fjør høvdu verið úti á skúlum og greitt frá um vandarnar við Arto. Tá vóru tað heilt nógv, sum bóðu okkum um ráð. Annars er tað ofta, tá fjølmiðlarnir taka evnið upp, sigur Ingunn Eiriksdóttir. Hon leggur afturat, at tað sum oftast eru tey, sum hava verið úti fyri onkrum keðiligum, ella foreldrini hjá teimum, sum spyrja Dátueftirlitið um ráð.

Niðanfyri eru nøkur dømi, um hvussu Facebook verður misnýtt.



## Arbeiðsgevarar »stjala« av netinum

Í Noregi er eitt dømi, har ein maður ikki fekk eitt starv hann søkti, tí arbeiðsgevarin metti hann at vera sálarliga óstøðugan. Maðurin hevði tíggju ár frammanundan hildið ein fyrilestur, har hann millum annað greiddi frá, at hann hevði verið í sálarligari viðgerð. Hesin fyrilestur var lagdur út á netið, uttan at maðurin visti av tí. Hesar upplýsingar leitaði arbeiðsgevarin seg fram til á internetinum í sambandi við starvssetanina, og noktaði við hesi grundgeving, at maðurin varð settur í starv.

– Hóast ongar kanningar eru gjørdar her hjá okkum, so kann mann rokna við, at arbeiðsgevarar kanna persónin á internetinum, áðrenn eitt starvsfólk verður sett í starv, staðfestir Ingunn Eiriksdóttir á Dátueftirlitinum.

## Fimleikamyndir til annað endamál

- Eitt føroyskt fimleikafelag vendi sær í 2007 til Dátureftirlitið fyri at gera vart við, at ein føroysk heimasíða endurgav myndir frá felagsins heimasíðu á ein bæði særandi og villleiðandi hátt. Millum annað hevði heimasíðan nærmyndir av ávísum kropslutum hjá íðkandi fimleikarum. Eftir at fimleikafelagið hevði gjørt vart við hetta, vórðu myndirnar tiknar av heimasíðuni, stendur á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

Ingunn Eiriksdóttir greiðir frá, at millum annað stóðu tekstir sum.

- Hvar er hendan hondin á veg?

Hon vísir somuleiðis á, at onkrar av myndunum vóru viðgjørdar, og eisini vóru orð løgd í munnin hjá áskoðarum.

## Hakkarar elska Facebook

Ofta kemur tað fyri, at hakkarar nýta Facebook fyri at geva fólki virus, umframt at ræna upplýsingar. Tað kann bæði vera umvegis falskar profilar ella til dømis, at tú fært ein film sendandi, har tað er viðmerkt okkurt stuttligt um, at tú ert við í filmsklippinum. Síðani kemur tú inn á eina heimasíðu, har tú skal taka eina nýggja útgávu av Flash ella onkrum tílíkum niður, áðrenn tú kanst síggja filmin. Tá tú hevur trýst á hetta, hevur hakkarin longu atgongd til alt, hann hevur hug at vita, sigur Ingunn Eiriksdóttir, sum tí bert kann viðmæla fólki at lata vera við at trýsta á ting, tú ikki kennist við.

## Happing er ein trupulleiki

– Vit hava haft dømi, har fólk hava nýtt tekst og upplýsingar hjá fólki til happing. Hetta hevur ikki verið í samband við Facebook, men á Arto hevur hetta onkuntíð verið ein trupulleiki, sigur Ingunn Eiriksdóttir. Hon leggur afturat, at viðurskiftini somuleiðis kunnu verða fevnd av reglunum í revislógini um ærumeiðing, og tí skalt tú hugsa teg væl um, áðrenn tú skrivar okkurt ella leggur myndir á netið.